# Læraravegleiðing: Tilfarsgóðska

**Evni**

- Eginleikar hjá tilfari
- Góðska

**Mælt tíðarlongd:**

- 45 min.

## Introskeið

Undirvísingartilfar til at fremja burðardygd og endurnýtslu í byggivinnuni

## Innleiðsla

Tilfarið inniheldur eitt sjónband, ið gevur lærlinginum innlit í góðskuna hjá tilfari. Endamálið við sjónbandið er at geva næminginum fatan av, nær eitt tilfar er av góðari góðsku ella av minni góðari góðsku.

Til sjónbandið er ein uppgáva við einum røðum av spurningum, sum lærlingurin skal finna svar til. Uppgávan tryggjar, at lærlingurin arbeiðir við viðkomandi evnum fyri at røkka lærumálunum fyri tilfarið.

At enda verður vitanardeiling í flokkinum, har lærlingurin fær møguleika at deila síni svar tiol spurningarnar í uppgávubløðunum og hugleiða um innihaldið í sjónbandinum.

## Fyrireiking

Lærarin skal:

- Kunna um tilfarið/undirvísingina
- Lata lærlingin byrja við at hyggja at sjónbandið
- Hjálpa lærlinginum við at svara uppgávubløðunum eftir tørvi.
- Stýra vitanardeilingini og geva øllum luttakarum møguleika at leggja síni svar fram til uppgávurnar og koma við spurningum, viðmerkingum og forkláringum.
- Hjálpa við at forklára svarið hjá luttakaranum og skriva tey sum felags floksviðmerking.

Luttakrin skal:

- Kunna síggja og hoyra sjónbandið
- Kunna greiða frá (deila sína vitan) við at svara spurningunum í uppgávuni
- Kunna lurta eftir svarum frá øðrum luttakarum
- Kunna gera notatir, sum hjálpa teimum at minnast sína vitan og sínar meiningar.

Skipan:

- Luttakararnir kunnu luttaka í undirvísingini sjálvstøðugt ella í smærri bólkum.

# Læraravegleiðing: Materialugóðska

## Læringarmál

Yvirskipað

- Lærlingurin fær innlit í ymiskar góðskur og styrkir hjá byggitilfari.
- Lærlingurin fær fatan av, nær okkurt kann endurnýtast, og nær tað ikki kann.
- Lærlingurin fær innlit í ymisk sløg av tilfari.
- Lærlingurin kann yvirskipað lýsa, hvat CE-merking er.

## Innihald og endamál

Luttakarin skal arbeiða við hugtøkunum um góðsku hjá tilfari, eginleikar, CE-merking og Snið til skilnað

## Uppskot til undirvísingargongd

Lærarin byrjar undirvísingina og leggur tilfarið/gongdina fram: Innleiðing/endurinnleiðing til heimasíðuna.

Sjónband (5 min)

- Næmingurin hyggur at sjónbandinum um góðsku hjá tilfari

Uppgávur til sjónbandið (30 min)

- Eftir at lærlingarnir hava sæð sjónbandið, skulu teir arbeiða við at svara spurningum og loysa uppgávur, sum eru tengdar at evninum, ið tryggjar, at lærlingurin røkkur lærumálunum.

Samandráttur í felag (10 min)

- Lærarin stýrir einari samanumtøku av nýggju vitanini, sum næmingarnir hava fingið.

## Sundurgreining

Førleikin hjá luttakaranum, til at fata og hugleiða um innihaldið í sjónbandinum og leita eftir vitan um evnið, gevur møguleika at geva meira ella minni framkomin boð uppí vitanardeilingina.

## Feedback og meting

Við hvørjum íkasti fær luttakarin beinleiðis feedback frá læraranum, tá lærarin hjálpir við at forklára grundgevingina, áðrenn íkasti verður skrivað á talvuna. Luttakarin upplivir, at "góð" boð verða virðismett og skrivað beinleiðis á talvuna, meðan ógreið/skeiv íkast verða umarbeidd saman við læraranum, áðrenn tey verða skrivað á talvuna.